# Eysturkommunu býráð
# 520 Leirvík

## Býráðsfundur verður mánadagin tann 28. november 2016 kl. 19.30

**Fundarskrá:**

1. **16/00367**
   **Losjan 85 ár**
   Felagskapurin Losjan glotti fyllir 85 ár. Bygningurin er 80 ár, og fólk vita at sjónleikur er fyrstu ferð spældur í Gøtu fyri 90 árum.

   Mentanarnevndin mælir til at Losjan Glotti fær 85.000 kr. í gávu til pall-listina.

   Málið var á skrá á seinasta fíggjarnevndiarfundi, men samtyt var tá at taka máli av skrá.

2. **14/00243**
   **Neystini á Oyrini í Norðragøtu matr. nr. 75c, d og e**
   Uppskot til endurgjald fyri neystini fyriliggur

   *Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

3. **16/00007**
   **Nýggjur dagstovnur í Eysturkommunu**
   Arbeiðsbólkurin sum var settur til at gera eina frágreiðing um verandi stovn og eina komandi útbygging, hevur gjørt frágreiðing.

   Trivnaðarnevndin mælir til at taka undir tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum.

   Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hja trivnaðarnevndini.

4. **16/00390**
   **Umsókn um keyp av lendi, matr. nr. 301 í Leirvík**
   Umsókn er móttikin frá borgara sum hevur keypt eini eldri hús og hevur ætlan um at byggja nýtt sethús á stykkið, matrikul nr. 300 í Leirvík.

   Tá ið matr. nr. 300 einans er 184 $m^2$ til støddar, er umsókn send til Eysturkommunu um at keypa ein part av matr. nr. 301 sum er ogn hjá kommununi og uml. 8 $m^2$ til støddar.

   Byggi- og býarkskipanarnevndini mælir til at selja uml. 8 $m^2$ av matr. nr. 301 at leggja til matr. nr. 300.

5. **14/00265**
   **Umsókn um loyvi til at seta flótianlegg upp í bátahylinum undir Gøtueiði**
   Verkætlanin er bjóða út til 4 fyritøkur, men bert ein fyritøka hevur givið tilboð uppá arbeiðið.

Um arbeiðið skal gerast og tikið verður av innkomna tilboðnum, verður neyðugt við eykajáttan á 100.000,00 kr.

Vinnunevndin mælir til at taka av fyriliggjandi tilboðið og at veita eykajáttan á 100.000 til verkætlanina.

**6. 16/00315**
**Fíggjarætlan 2017**